DAGSINS MEINING

Gongur rætta vegin

Bretskir myndugleikar kunngjordu nú um dagarnar úrslitið av 22. útbjóðing til leiting eftir kolvetni á landgrunninum. Og ikki kann sigast annað enn, at tað er eitt gott signal til okkara egnu kolvetnismyndugleikar og vinnuna, nú flestu av nýggju loyvunum eru latin á Atlantsmótinum og her ikki minst allan vegin framvið okkara marki. Tað sigur í hvussu er so mikið sum, at altjóða oljufeløg hava ikki mist áhugan fyri økinum, sum er beint við okkasra egna mark og framhald av teimum teigum, sum longu eru bodnir út hjá okkum.

Í forlongilsi av hesi útbjóðingini kemur so okkara nýggja útbjóðing. Tað vil tí vera rættiliga náttúrligt at rokna við, at felógini, sum hava fingið tillutað loyvi bretsku megin markið, eisini fara at hava áhuga í at fáa loyvi føroyskumegin markið, tí tá kunnu tey koma at arbeiða við samanhangandi økjum, tó hvør sínu megin markið.

Vitandi at politisk mørk ikki eru jarðfrøðilig mørk, og vitandi, at tað er ikki óvanligt, at olju- og gassfelt kunnu ganga tvørtur um mørk millum lond, er tað eisini ein logisk niðurstøða, at oljufeløgini, sum síggja Atlantsmótið sum eitt nýtt og spennandi oljuøki, fegin vilja hava fatur á goymslum í undirgrundini, líka mikið um tær liggja á føroyska og bretska landgrunninum. Einasti munur eru so sjálvandi treytirnar, sum bæði londini seta felógunum. Við verandi oljuprísum átti tað tó ikki at verið nøkur forðing. Munurin er kanska "bara" basaltið okkara megin. Men postiva avbjóðingin er so aftur, minnast vit aftur á tað, sum umboð fyri Oljufyrisitingini greiddi frá á oljumessuni í Norra herfyri, at møguleikar eru fyri at gera risastóra fund undir sama basalti.

At ljóskastarin aftur av álvara er settur á Atlantsmótið við hesi bretsku útbjóðingini er ikki til at taka feil av. Tá so stór oljufeløg sum Shell og BP, Statoil og ChevronTexaco, ENI og BG og Amerada Hess fyri bert at nevna nøkur framvegis kappast um at fáa leitiloyvi nærhendis okkara marki, so merkir tað, at vónirnar til at finna olju og gass framvegis eru til steðar.

Vit kunnu so bara vóna, at bretska útbjóðingin ikki drenar alla orku, her eisini peningaligu orkuna hjá felógunum, soleiðis at tey velja okara egnu 2. rundu frá. Men tá hugsað verður um, at partur av strategiini hjá oljufeløgunum hinvegin er at spjaða váðan, so er eisini hugsandi, at tey gera tað í hesum førinum eisini, tvs. at tey vilja spæla uppá fleiri hestar, soleiðis at skilja, at fáa tey ikki fatur í tí rætta á breskum øki, so gera tey tað kanska føroysku megin markið.

Tað er kærkomið, at eitt so stórt felag sum ChevronTexaco, nú av álvara setir fokus á alt økið framvið markinum úr suðuri og heilt norður. At Statoil eisini er við er í tráð við úttalilsini hjá stjóranum í felagnum herfyri. Men umframt hesi felógini eru so øll hini aftrat, og tað er bara at vóna, at tey ikki steðga við tí 22. UK-runduni men eisini koma við í 2. rundu her hjá okkum. Annars tillukku til føroysku felógini, at tey nú eisini eru komin við av álvara í oljuleiting aðrataðni.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Líka fyri lógini ???

Marjun Olsen
Tvøroyri

Hesin spurningur er ógvuliga aktuellur á Tvøroyri í hesum døgum. Fólk flest hava hoyrt í útvarpinum um eina undaliga starvsetan av leiðara í Fríðtíðarskúlanum í Trongisvági.

Lýst var í bløðunum eftur pedagogi. Tveir umsøkjarir vóru. Ein pedagogur sum arbeiðir í Fríðtíðarskúlanum á 4 ári og hevur allar førleikar at røkja starvið, fult líka væl sum nakar annar.

Hin umsøkjarin, lærari, slektaður av Tvøroyri, búsitandi í Havn og hevði hug at royna at búgva her suðuri eina tíð, fær starvið.

Pedgogfelagið og Landsstýrismaðurin á økinum gera kommununa varðuga við at skeift er fari fram í hesi starvsetan. Aftaná knappar 4 vikur sigur kommunan seg at hava loyst máli.

Loysnin er henda !!!
Landstýrismaður á økinum Hans Pauli Strøm biður um fund við alt býráði, men bert javnaðarmennirnir Sverri Midjord, Heri Mortensen og býráðsformaðurin Kristin Mikkelsen møta (restin av býráðnum fær ongantíð boðini) À fundinum verður samtykt at ógilda setanina av læraranum, men landsstýrismaðurin skal broyta Dagstovnalógina soleiðis, at tað í framtíðini skal kunna setast lærari sum leiðari á Fríðtíðarskúlum. Seinri hevur fullmannað sosialanevnd og fullmannað býráð fund, sum samtykkir at ógilda starvssetanina av læraranum. Samtykt verður eisini at søkjast skal av nýggjum eftur leiðara. Nú skuldi man trúð at søgan endar, nei nú blívur hon rættuliga spennandi.

Meirilutin í sosialunevnd Sverri Midjord, Heri Mortensen løgdu uppskot fram um at seta ein fyribilsleiðara til landsstýrismaðurin hevur broytt lógina og **gitið nú tvøra- og føroyafólk** hvør hesin fyribilsleiðari er. Púra rætt, sami lærari sum beint bleiv loystur úr starvi.

Her á Tvøroyri er alt við tað gamla, bert tú ert av rætta slagnum, ert tú væl syrgdur fyri.

Rættartrygd: **Hvat er tað ???**

Hvør misnýtir 4.statsmaktina í Føroyum?

Marjus Dam
løgtingsmaður

Hvør er tað, ið manipulerar 4. statsmaktini við vindandi skeivum upplýsingum?.

Situr Høgni Hoydal enn einaferð aftanfyri sínar dyr og smílist, tí aftur eydnaðist at lumpa 4.statsmaktina at taka upp skeiv tíðindir til høvuðstíðindir, fyri at skaða sitandi samgongu? Tað er tað mangt, ið bendir á.

Seinastu tíðina hevur mangt og hvat verið at hoyrt í 4. statsmaktini: Útvarpi, Sjónvarpi, og bløðum okkara.

Men onkuntíð kann ein ikki annað enn undrast á nøkur viðurskiftir

Undanfarni Landsstýrismaður í fíggjarmálum setti ein bólk at kanna alla MVG lógina. Sagt var, at mongu undantøkini vóru við til at úthola MVG lógina. Embætismannabólkurin hann setti, hevur nú arbeitt í nøkur ár. Og hann heldur sjálvandi fram at arbeiða sjálvt um núverandi samgonga hevur tikið við. Bólkurin er nú liðugur og tilfarið verður sent til hoyringar hjá ymiskum felogum. Men mest sannlíkt er, at Tjóðveldisflokkurin hevur fingið fatur í tilfarinum, og klippir bitar úr arbeiðinum og sendir tað til pressuna - fyri at villeiða.

Og í pressuni verður endurgivið - púra skeivt - at Landstýrið arbeiðir við at ... nærum forkoma øllum virksemi her á landi.

Nú eri eg valdur í Løgtingið og eri í samgongu. Og eg kann upplýsa, at ongin ætlan um at forkoma hesum landi fyriliggur. Tann uppgávan verður bert loyst við at gjøgnumføra stevnuskrá Tjóðveldisfloksins. Og henni ganga vit als ikki eftir. So á hesum øki, kunnu fólk verða púra trygg.

Men áliggur tað ikki 4. statsmaktini at verða kritiskur og kanna, hvør keldan er?. Tí tað kann ikki vera endamálið hjá 4. statsmaktini at bera rangan tíðindaflutning. Gera teir tað, so renna teir politisk ørindir og missa harvið fullkomuliga sítt trúvirði.

Innsent tilfar
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent aðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Ráfiskastøðan

Árni Joensen
form. Føroya Ráfiskaseljarafelag

Av tí at nakað av skriving hevur tikið seg upp, nú arbeiðsloysi økist (higartil uml. 4-5 %), tykist alt benda á ta borðið, at rávøra okkara, fiskurin, nærum fyri einhvønn pris, skal tvingast inn á føroysk framleiðsluvirkir.

Alt gott um hugsanina at skapa sum mest av arbeiði í landinum og helst til allar arbeiðsførar hendur, men tað er nú einaferð so, at tað eru tvær síður í eini søk og so er eisini her.

Virðisøkingin í framleiðsluliðinum er sera týdningarmikil fyri samfelagið og hvørki kann ella skal undirmetast, men við vánaligum marknaði kann hon eisini gerast negativ og hvat er so vunnið á landi.

Hinvegin so skal ein stoðug rávørutilgongd til hjá virkjunum, fyri yvirhøvur at fáa sáttmálar við góðar keyparar, tí leveringstrygd er ein grundarsteinur undir góðum og stoðugum handli.

Tað tykist sum at teir persónar, ið alment hava átikið sær at skriva um hetta mál eru ikki sært subjektivir og hugsa nærum bert um ta einu síðuna av málinum, nevniliga at helst skal øll veiða fyri einhvønn pris leggjast upp her í landinum til virkingar og virðisøkingar.

At skipaeigarar- og seljarar vilja hava sum mest fyri fiskin er eyðsæð, og átti ikki at undra nakran, men vit vilja ikki hava sitandi á okkum at vit útflyta feskan fisk, tí at vit bert hugsa um okkum sjálvar og ikki samfelagið. Í fleiri førum er spurningurin at avmarkað eitt tap hjá skipunum, so hjá teimum er støðan ikki góð og stoðga skipini so er lætt at gita um úrslitið.

Tað er sum kunnugt nevniliga so, at fyri at fáa fatur í fiskinum, skulu veiðufør til, og fyri at sleppa at veiða skulu veiðuloyvi til, og alt hetta kostar sera nógv og skal sjálvsagt forrentast.

Tað er ein sannroynd í hesum stuðulsfríu tíðum, at virkini á landi, við lógini um vinnuligan fiskiskap í hendi, ómakaleyst fáa fatur á ein føstum parti av rávøruni, tí at reglur tryggja hesum. Teimum nýtist ikki at gera so nógv burturúr, tí skipini noyðast at leggja ávísa nøgd uppá land, skulu tey ikki verða revsa við at missa fiskidagar.

Vit, ið fáast við sølu av feskum fiski, hava mangan verið, og koma av og á útí ta stoðu, at virkini á landi ikki megna at takað ímóti veiðu- ella þortum av veiðu okkara og hinvegin, so ger hitt øvugta seg eisini galdandi, har eftirspurningurin er størri enn útboðið, men hóast tað, so fæst prísurin her heima ikki upp, eins og í grannalondum okkara tá eftirspurningurin økist.

Tað er veruliga her, ið skógvurin trýstur, tí hvat gert tú tá virkini her heima av og á ikki klára at taka ímót, - ella ikki vilja lyfta prísin upp á støðið har útlendingar mangan eru.

Soleiðis eru nakrir spurningar, ið vit av og á skulu taka stoðu til m.a.:

- Hvat gera vit við fiskin tá virkini ikki megna at taka ímóti? (hendir av og á).
- Hvat gera vit við fiskin tá virkini eru stongd vegna frítíð?
- Hvat gera vit við fiskin tá arbeiðsteðgur tekur seg upp?

Hví eru t.d. prísirnir her heima so javnt lágir fyri okkara størstu rávøru, t.d. upsan og hýsuna, tá útlendingar hinvegin, hóast alt, av og á megna at lyfta prísin upp, bæði tvær og tríggjar ferðir prísin her heima, sjálvsagt alt eftir útboði. Har er so hóast alt "lív" í prísgongdini og ein náttúrlig javnvág millum útboð og eftirspurning, har avspeglingin sæst í prísinum.

Er tað sølan av liðugtframleiddum vørum sum haltar, við harav vánaligum rávøruprísum?

Hvat er vorðið av tí dynamisku prískappingini, ið verða skuldi?

Jú, orsøkin er heilt einfalt hon at ov fáir keyparar eru at bjóða uppá fiskin, (ikki tí hetta hendir eisini av og á í grannalondum okkara), men her heima skulu skipini smbrt. lóg leggja ein lutfalsligan part av veiðuni upp í Føroyum og tá henda lóg tryggjar rávøruna, so gerst ómakurin at fáa hendur á henni, tilsvarandi minni.

Vit skulu fegnast um, at bæði veiðu- og søluliðið av feskum eru so mikið at sær komin, at tey gjølla fylgja prísgongdini á marknaðinum í grannalondum okkara og fegið vil søkja slíkar marknaðir eisini, tí um alt stóð, - ella fall við heimamarknaðinum, so eri eg bangin fyri at soðið gjørdist ov tunt, við teirri avleiðing at flotin, - ella partar av honum ikki hóraðu undan.

Tað tykist sum planbúskapurin er við at troka seg innaftur gjøgnum bakdyrnar og at tað ræður um, við lógini í hond, at fáa alt at stagnera í berum máttloysi.

At fiskakeyparar siga seg, - hóast royndir, ikki at fáa fatur í fiskinum hevði verið møsn, um proformasølurnar vóru avtiknar, og hesar kunnu bert avtakast við at broyta - ella avtaka kunngerð nr. 148. Henda kunngerð ger meiri skaða enn gagn, men torført tykist at fáa hana avtikna, so her kundu politikkararnir hóskandi byrjað …

Um onnur krøv, sum t.d. flokking koma, ja, so lat tað avspeglast í prísunum, soleiðis at tað veruliga loysir seg.

Hygg t.d. at flotanum, ið fiskar uppsjóvarfisk, har eru ikki avmarkingar til hvussu nógv skal leggja uppá land í Føroyum og hvussu nógv kann landast uttanlands og júst hetta frælsi hevur økt um føroyska kappingarføri og skapt ein neyðugan prísdynamikk, til gagns fyri bæði skip og virkir.

Ongar avmarkingar eru til rækjuflotan, tá um sølu av vøruni ræður. Hesin partur av flotanum liggur tíverri tungt í sjónum, men her er orsøkin nokk ov stórt útboð av rækjum í mun til eftirspurningin.

Ongar avmarkingar eru til alda fiskin, alararnir hava neyðugt frælsi frá føroysku mynduleikunum, hóst teir eins og vit hava eitt loyvi frá myndugleikunum. At teirra marknaðarstøða líkist tí hjá rækjuflotanum, kemur helst av eini altjóða ovurframleiðslu.

Hví skal botnfiskaflotin so hava avmarkingar, tá um avreiðing ræður, hví skal lóg til fyri at tryggja virkjunum vøru, - er tíðin ikki farin frá protectionismu?

Boðskapurin má vera: Lat vinnuna skipa seg sjálva …

Um t.d. øll kunngerðin nr. 148, ella partar av henni verða strikaðar, (orðingina, … at fiskurin skal bjóðast út og seljast) burtur, serliga orðingina: at fiskurin skal seljast, tí tað er her at trupulleikin stingur seg upp, og er sjálv rótin til proformasølurnar, so verða ongar proformasølur, tí so verður fiskurin heilt einfalt bjóðaður út, men ikki tvingaður ígjøgnum eina sølu fyrrenn rætti marknaðarprísurin er fingin, tað verði seg úti ella heima.

Tvang elvir ongantíð til nakað gott og positivt!

Latið okkum latað upp fyri at fáa eitt breiðari- og meiri fjølbroytt úrvæl av keyparum, ið kappast sínamillum, soleiðis at rávøra okkara kann fáa tann prís hon eftir marknaðinum veruliga hevur uppiborið og latið okkum saman loysa hesar, fyri vinnuna so viðkomandi spurningar.

Sp/f Røkt hevði í fjør nærum hálva aðru millión í avlopi

Pengar í vindinum

Sp/f Røkt, sum eigur Vindmyllurnar uppi á Mýrum við Vestmanna, hevði í fjør eitt yvirskot áljóðandi 1.446 tkr.

ROKNSKAPUR
Jákup Mørk

Sp/f Røkt hevur annars fyri tað mesta fingist við Áling fram til í fjør summar, men tað er helst ikki í hesum, at positiva ársúrslitið liggur. Av ársfrágreiðingini framgongur eisini, at felagið fyribils er steðgað við smoltframleiðslu fyri egna rokning, men at teir ístaðin ala smolt fyri aðrar. Hetta tí vágin í virkseminum fyri útseting av alifiski í løtuni er ov stórur.

Primeri raksturin gevur eitt úrslit upp á 2.297 tkr., og hóast talan framvegis er um stórar rentuútreiðslur, so er hetta talið væl og virðiliga nóg stórt til at tryggja lønsemi í framleiðsluni.

Í ársfrágreiðingini verður einki nevnt um, hvørjum úrslitum roknað verður við framyvir, men tað verður tó staðfest, at virksemið við vindmyllunum væntandi fer at økja um lønsemi felagsins. Samstundis verður í roknskapinum upplýst, at menningarkostnaðir verða útreiðsluførdir, so hvørt sum hesir koma fyri.

Okkum hevur ikki eydnast at fáa fatur á stjóranum í felagnum, Jóhan Leivur í Niðristovu, men tað er helst lítið at ivast í, at menningarkostnaðirnir hava verið hampuliga stórir hetta fyrsta árið, sum streymframleiðsla hevur verið partur av virkseminum. Og tá hetta virksemi hartil bert hevur fevnt um part av árinum, er lítið at ivast í, at talan hjá Sp/f Røkt er um ein góðan sáttmála um streymframleiðslu, sum teir hava gjørt við SEV.

Víðari kann sigast, at avskrivingartíðin fyri vindmyllurnar er 15 ár, og svarar hetta til áramálið, sum felagið í fyrstu atløgu fer at framleiða streym fyri SEV. So er spurningurin, hvørt teir eisini fáa loyvi at binda nýggjar vindmyllur í kervið hjá SEV, og – um so er – hvønn søluprís teir tá kunnu samráða seg til við felagsskapin.

Samlaða fíggjarjavnvágin í felagnum var við árslok 2003 22.175 tkr. Av hesum er eginognin 5.454 tkr.

Virðisøking og sporføri av fiskavørum

TÍÐINDASKRIV
frá Menningarstovuni

Í døgunum 30. september og 1. oktober verður ráðstevnan »Value Added Seafood« á triðja sinni hildin í London. Tær báðar fyrru ferðirnar hevur henda ráðstevnan verið stak væleydnað.

Ráðstevnan fer m.a. at snúgva seg um menning av nýskapandi virðisøktum sjómati, niðursjóðaðum sjómati, menning av frystum fiskavørum, fyrireikingum til sporfórislógina í 2005, nýskapandi pakkitilfar, marknaðarrák, o.a.

Í sambandi við at fleiri føroyskar fiskaútflutningsfyritøkur luttaka á ráðstevnuni skipar Menningarstovan saman við Umboðsstovu Føroya í London fyri áhugaverdum vitjanum, ið júst hava við t.d. virðisøking, marknaðarrák og marknaðartilgongd at gera.

Ætlanin er at vitja Billingsgate fiskamarknaðin og har fáa at vita, hvat rákið innan feskan fisk er. Tosað verður eisini við innkeypsstjóran á Young's Blue Crest við tí endamálið at hoyra hansara meiningar og metingar um kundakrøv, og um hvør innkeypspolitikkur vanliga verður førdur av týdningarmiklastu fiskakeyparunum í Onglandi. Eisini ferð Hazel Curtis at leggja fram frágreiðing, sum SEAFISH og KPMG hava gjørt um virðisketuna fyri m.a. tosk og hýsu á bretska marknaðinum. Hendan frágreiðingin gevur eitt gott innlit í, hvussu bretski toska- og hýsumarknaðurin er skipaður.

Meiri fæst at vita um ráðstevnuna á www.agra-net.com